# Eitt heim í stórbýnum

Tað er einfalt hjá føroyingum at flúgva til Reykjavíkar við Atlantsflogi. Og velur ein at leiga sær kamar á Hotel Örkini, er ein samstundis mitt í býnum, stutt frá øllum tí sum ger tað stuttligt at ferðast í høvuðsstaði Íslands.

Hotel Örkin er føroyska sjómansheimið í Reykjavík. Her verður roynt at skapa eitt heimligt umhvørvi fyri sjómenn og føroyingar annars, sum búgva í Íslandi ella koma at ferðast hagar.

Leiðarin Hans Michael í Mittúni og konan eru føroyingar, og verður roynt at fáa so nógv føroysk starvsfólk sum gjørligt.

Sjómansheimið Hotel Örkin er eitt 3-stjarnað hotel sum hevur hevur 20 dupult kømur.

10 av teimum kunnu nýtast sum 4-mans kømur. Øll kömrini hava wc/bað, litsjónvarp og telefon. Eisini er atgongd til tráðleyst internet.

Hotellið hevur eisini eitt fundarhøli, sum er 92 fermetrar, og hevur pláss fyri 100 fólkum til fundir og líknandi. Til veitslur, føðingardagar, konfirmatiónir og annað kann borðreiðast til 75 fólk.

Hotellið hevur eisini eitt minni fundarhøli, har pláss er fyri 30 fólkum til fundir. Her kann borðreiðast fyri 20 fólkum.

Sjómansheimið liggur ikki so langt frá miðbýnum, bara einar 15-20 min. til gongu til handilshúsið, Kringluna, ítróttarøkið, svimjihøll og listasavn.

Skjótt er at koma til Íslands: At flúgva til Reykjavíkar tekur bara ein tíma, og við skipi einar 16 tímar til Seyðisfjarðar.







FØROYSKT HEIM

*Sjómansheimið Hotel Örkin er ein útrættur armur til føroyingar í Íslandi og føroysk ferðafólk*

## Sjálveigandi

Starvsfólk: Roynt verður at hava so nógv føroysk starvsfólk sum gjørligt. Er onkur sum hevur áhuga at starvast á sjómansheiminum í Reykjavík, so kann ein seta seg í samband við hotelstjóran.
Føroyska Sjómansheimið Örkin er annars ein sjálveigandi stovnur, har nevndin er sett saman av føroyingum og føroyingum, sum búgva í Íslandi. Nevndin hevur fund árliga í Reykjavík ella í Føroyum. Í nevndini sita: Árni Jacobsen, Leirvík; Erland H. Rasmussen, Argir; Jørmund Foldbo, Leirvík; Jonhard Joensen, Skipanes; Rúni Hentze, Hoyvík; Jens Péturon, Reykjavík og Absalon Olsen, Reykjavík.






MANSLEGA

*Hetta vikuskiftið varð sjómansheimið enn einaferð karmur um eina legu, tá menn úr Føroyum settu hvørjum øðrum stevnu í íslendska høvuðsstaðnum*